# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800




## Eftirlønarmálið – eitt kjarnuøki í valstríðnum

Valfundurin í Skopun var bæði lívligur og viðkomandi við sakligum orðaskifti millum valevnini og týdningarmiklum spurningum frá áhoyrarunum. Sum vera man snúi ein stórur partur av fundinum seg um fasta sambandið millum Sandoy og Streymoy, har orðaskiftið ikki gav nakað nýtt – her var lítil munur á sjónarmiðum. Øll ynskja fast samband – munurin er bert á sjónarmiðum viðvíkjandi fíggingarhátti og tíðarkarmum.

Hitt stóra málið á fundinum snúði seg um eftirlønarmálið. Spurningurin, hvussu vit í framtíðini skulu skipa okkum við hesum máli, er ein hin størsti politiski spurningurin ikki bert her hjá okkum men í øllum vesturheiminum. Trupulleikin er greiður – tað gerast alt færri og færri at uppihalda fleiri og fleiri. Bólkurin av gomlum og eldri borgarum økist støðugt, meðan tey, sum skulu bera samfelagið víðari og tryggja vælferðina hjá øllum, eisini hjá teimum mongu, sum eru farin av arbeiðsmarknaðinum vegna aldur, gerst minni og minni.

Tað, sum kann staðfestast eftir fundin í Skopun í gjár, er, at Føroyar, hvat eftirlønarspurninginum viðvíkur, eru við at gerast eftirbátur, um vit samanbera okkum við grannalondini. Vit hava heilt einfalt ikki megnað at skapa ta ella tær skipanir, ið skulu tryggja einum vaksandi liði av eldri og gomlum. Grannalondini hava megnað hetta við at eggja ella noyða løntakararnar at hava privatar ella fakfelagsgrundaðar eftirlønarskipanir sum ískoyti til fólkapensiónina. Vit komu alt ov seint í gongd, og skipanirnar eru alt ov veikar. Tað er ikki ov seint at finna haldgóðar loysnir, og politisku útmeldingarnar á fundinum í Skopun vóru bæði áhugaverdar og realistiskar. Hvør endin verður er enn óvíst. Tað kann tó staðfestast, at allir flokkar ásanna álvaran í hesum máli. Eftirlønarmálið verður ivaleyst eitt kjarnuøki í valstríðnum, og tað er væl skiljandi al tann tíð hetta mál hevur sera stóran áhuga hjá øllum borgarum. Tann samgonga, sum tekur við eftir tann 19. januar má taka hetta mál í størsta álvara, og tann haldgóða og varandi loysnin má og skal finnast í komandi valskeiði, og hon má byggja á eitt breitt politiskt grundarlag. Hetta mál kann ikki bíða longur.

**Sosialurin**

# Tað snýr seg um at vera millum 10 tey bestu

**Persónfikseraða valstríðið – og nýggja skipanin við einum valdømi – kollvelta politisku skipanina**

**SÍÐULINJAN**
*Eirikur Lindenskov*
*blaðstjóri*



- Fyri fyrstu ferð í 80 ára fara suðuroyingar at upplíva, at tey ongan javnaðarmann hava á tingi.

Hendan hypotesan kann lættliga gerast veruleiki eftir komandi val – og tað verður so als ikki tí, at suðuroyingar fara at svíkja Javnaðarflokkin, men tí at landins politikarar hava svikið tey gomlu valdømini við at skunda eina valskipan við einum valdømi ígjøgnum, uttan at flokkarnir á nakran hátt eru gearaðir til tað.

Ikki tí, Jóannes Eidesgaard verður uttan iva afturvaldur. Men vit kunnu líka so lættliga rokna við, at hann heldur fram sum løgmaður, – og hjá teimum trimum sitandi stjórnarflokkunum er einki annað boð upp á løgmann enn Jóannes Eidesgaard.

Um so verður, so fer hann samstundis úr løgtinginum, tí tað ber ikki til at sita í løgtinginum og landsstýrinum í senn. Tískil verður endin tann, at t. d. Eyðgunn Samuelsen í Klaksvík fær sessin ella Hans Pauli Strøm í Vestmanna – bara fyri at nevna tvey tilvildarlig dømi – tí tað kann vera hvør sum helst. Mest sannlíkt er tað tó, at varafólkið hjá løgmanni ikki kemur úr Suðuroyar valdømi, tí har eru bara trý onnur valevni, sum neyvan vera á topp 10 listanum.

Eitt annað hugsað dømið kundi verið Jørgen Niclasen, formaður Fólkafloksins. Hann er – eins og øll onnur valevni við vágablóði í æðrunum, glóðheitur talsmaður fyri at varðveita flogvøllin í oynni. Men ímynda vit okkum, at Jørgen Niclasen verður landsstýrismaður, so kann tað lættliga henda, at Poul Michelsen kemur á ting – og eisini at hann verður tann avgerandi atkvøðan fyri, at nýggjur flogvøllur verður bygdur á Glyvursnesi.

Sostatt kann endin verða tann, at vágafólk, sum bara hava valt Jørgen Niclasen, tí hann er trygdin fyri at varðveita flogvøllin í oynni, fáa Poul Michelsen í staðin. Hetta er sjálvandi bara eitt dømi, tí tað kann vera hvør sum helst annar, men tað verður so neyvan eitt valevni úr Vágum, sum verður varafólk hjá Jørgeni – og Poul Michelsen hevur havt leiklutin sum varamaður seinastu seks árini – men tá var tað fyri Bjarna Djurholm í Suðurstreymoyar valdømi.

Hvussu verður og ikki, so fara vit at síggja nógvar rembingar – og kanska tey fáa rætt, sum hava spátt, at maktin verður sentrerað um høvuðsstaðin. Í øllum førum í ein ávísan mun, tí tað tykist, sum um at tey pengasterkastu valevnini eru har.

Trupulleikin hjá flokkunum er, at teir als onga floksorganisatión hava. Tað er eitt afturstig fyri politisku organisatiónirnar, at Føroyar eru eitt valdømi – tí organisatiónin kann slett ikki fylgja við. Tí verður tað hin einstaki, sum førir sítt valstríð og hevur sína egnu profilering og síni egni vallyfti. Hetta er ein óheppin gongd.

Fara vit nøkur ár aftur í tíðina, so sást tú ikki myndir av nøkrum valevni. Valstríð var ført í felgasskapi, tí tað ráddi um at vinna flokkinum atkvøður. Gamaní vóru innanfloks intrigur helst líka vanligar, sum í dag, men tað ráddi meira um felagsskapin tá. Fyri 10 árum síðani royndi Javnaðarflokkurin at profilera Jóannes Eidesgaard sum boðið upp á nýggjan løgmann eftir Edmund Joensen. Veljarakanningar vístu, at Jóannes Eidesgaard lá eini 40% framman fyri táverandi løgmannin – men tað var kortini hildið í so næsadjarvt av einum flokki soleiðis at profilera formannin. Tak valstríðið í dag – tað er einki annað enn persónlig profilering – ikki við flokkinum sum baklandi, men egnum pengum ella stuðlum.

Sjálvstýrisflokkurin førir nú fram, at vit skulu hava gjøgnumskygni í valstríðnum, við at hvør flokkur og hvørt valevni leggur fram valroknskap, so øll kunnu síggja, hvussu nógvar pengar hvør nýtir – og hvør stuðular hvørjum.

Um hetta nú hevur størri týdning, enn at flokkarnir skipa seg í rættiligar felagsskapir, sum megna at føra valstríð, kunnu vit so altíð kjakast um. Men hjá okkum í miðlunum verður tað í øllum førum stuttligt at sleppa at rokna út, hvat hvør einstøk stemma kostaði...

Nú skulu vit ikki á hesum stað kolldøma nýggju valskipanina – als ikki. Men tað skerst ikki burt, at hon varð skrumblað og skundað ígjøgnum við onkrum heldur óítøkiligum motivi.

Tað er sjálvandi ilt at meta um, hvør missir og hvør vinnur. Men hugsandi er, at Suðuroy og Sandoy missa, meðan Suðurstreymur vinnur. Útjaðarin kann sjálvandi hava onkran atkvøðuslúk, men sum víst við dømunum við Jørgen Niclansen og løgmanni – so verða teirra tingsessir umboðaðir av øðrum valdømum, skuldu t. d. teir báðir farið í landsstýrið.

Hjá valevnunum snýr alt seg nú um at vera á topp 10 listanum – altso hjá teimum fýra stóru flokkunum. Onkur flokkur fær sjey tingfólk – og onkur fær átta. Onkur skal í landsstýrið – og tí verður boð eftir nr. 9 og nr. 10 hjá onkrum flokki.

Felagsskapurin – floksdisiplinin – og útjaðarin verða við sviðusoð...

**Á SÍÐULINJUNI gera blaðfólk á Sosialinum viðmerkingar í sambandi við løgtingsvalið**

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.